


AB vann í fjør silvur í landskappingini. Gullið tók KÍ sær – sum vant – av, men í ár ætla tey á Argjum at bróta siðvenjuna hjá annars einaráðandi klaksvíkarkvinnunum
Mynd: Álvur Haraldsen

# AB-kvinnurnar vilja koppa KÍ av trúnuni

**Venjarin hjá AB-kvinnunum, Lennard Petersen heldur seg havi eina nóg sterka manning til at bjóða roynda KÍ-liðnum av**

KÍ-kvinnurnar hava sitið tungt á trónuni, tað sum farið er av hesi øldini. Heili níggju meistaraheiti á rað hava klaksvíkskvinnurnar vunnið, og er tað eitt met, sum kann javnmetast við Dynamo Kiev í Ukraina, og Rangers og Celtic í Skotlandi. Í 2007 var nær við, at B36 koppaði KÍ av trónuni, men KÍ megnaði at venda 0-2 til 2-2 í tí avgerandi dystinum. Nú er B36 ikki í bestu kvinnudeildini. AB verður einasta umboðið hjá Suðurstreymoy í bestu kvinnudeildini, og venjari teirra, Lennard Petersen metir lið sítt vera nóg sterkt til at bjóða roynd KÍ-kvinnunum av. Argja Bóltfelag hevur eisini sett Hans Eivind Olsen – sum er vaksin upp í nærumhvørvinum kring vøllin – sum hjálparvenjara, aftrat Lennardi.

### Stóra tilgongd

Lennard er bjartskygdur:

– Tað, sum gevur mær vónir um, at vit kunnu fara allan vegin, er uppstarturin til kappingina, har vit hava fingið eina góða rekruttering. AB-kvinnurnar hava havt intensa venjingar tríggjar ferðir um vikuna. Olga Kristina Hansen verður aftur at finna á Argjum hetta kappingarárið, og sterka eiðiskvinnan, Doris í Garði hevur valt AB framum KÍ. Og sum Lennhard so vísuliga undirstrikar: – Tað er jú tveir vinningar fyri okkum, og tvey tap fyri KÍ.

– Hópurin hjá mær er ein blanding av royndum og ungum spælarum, har meðalaldurin er 20,5 ár. Nógvar av kvinnunum eru landsliðsspælarar, og tað letur ongan iva vera um, at talan er um talentfullar spælarar, sigur Lennard avgjørdur.

Rekrutteringin frá HB og B36 hevur ikki verið so umfatandi, talan hevur mest verið um gentur 14-17 ár, sum eru komnar frá HB.

Tað vera ikki so nógvir venjingardystir spældir hjá kvinnunum, áðrenn kappingarbyrjan. Og 24. mars hava AB-kvinnurnar bara spælt tveir venjingardystir, og hava báðir verið ímóti EB/Streymi. AB hevur vunnið báðar venjingardystirnar, ávikavist 5-0 og 4-0. Lennard hevur sostatt ikki sæð hini mótstøðuliðini, men eftir hansara tykki verður Víkingur eitt spennandi mótstøðulið.

### Kolliderar við hondbóltin

Spurdur um, hvussu tað ber til, at kvinnurnar spæla so fáar venjingardystir, svarar Lennard, at tað er tí, at tað kolliderar við hondbóltin, sum nógvar av kvinnunum íðka í vetrarhálvuni.

Spurdur um hann heldur, at kvinnurnar eiga at satsa uppá at íðka eina ítróttargrein, svarar Lennard, at hann heldur ikki, at Føroyar hevur nóg stórt fólkatal, til at ein kann hugsa í teimum breytunum.

Men Lennard heldur avgjørt, at Fótbóltssamband Føroya og Hondbóltssamband Føroya kundu tosað beuri saman, so tey fyrstu umførini í fótbóltskappingini, og finaluumførini í hondbóltskappingini ikki vóru avgreidd samstundis.

### Europeiski dreymurin

KÍ-kvinnurnar hava seinastu mongu árini havt møguleikan at roynt seg í UEFA Womens Cup, og tað er ein avgjørdur motivasjónsfaktorur fyri Lennard, Hans Eivind og kvinnurnar.

Hans Eivind sigur avgjørdur, at stendur AB við tí møguleikanum í 2010, so eiga tey avgjørt at føra hann út í lívið. Tá tað hevur borið til hjá KÍ-kvinnunum, so eigur tað eisini at bera til hjá AB-kvinnunum. Eisini fíggjarliga, so liðið kann fara avstað.

Málini fyri kappingarárið 2009 eru høg hjá venjaraparinum hjá AB-kvinnunum, og nógv skal til fyri at koppa sigursvandu KÍ-kvinnunum, men úti í felagshúsinum á Reynsgøtu 2A á Argjum, er trúgvin avgjørt til staðar.

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo